# timativa festivalin



*- Hvør festivaldagur hevur sítt at bjóða, og vit skulu taka av møguleikunum. Tað er nú, at vit skulu liva, og júst fólkalívið á festivalinum er kanska størsta styrkin hjá tiltakinum. Fólk minnast jú líka væl serstakar hendigar, tey hava upplivað, sum tónleikin, tey hava hoyrt, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskipari av Summar Festivalin*

at vit skulu liva, og júst fólkalívið á festivalinum er kanska størsta styrkin hjá tiltakinum. Fólk minnast jú líka væl serstakar hendigar, tey hava upplivað, sum tónleikin, tey hava hoyrt.

## Gott at vakna aftur

Nógvar góðar løtur eru ivaleyst hjá øllum festivalgestum ár undan ári, og ymiskt er eisini hvønn týdning tær ymsu hendingarnar hava fyri festivalgestirnir. Men fyri Steintór Rasmussen er eingin ivi.

- Tað hava verið nógvar fantastiskar og inniligar løtur á Summar Festivalinum. Millum annað var tað ein rørandi løta, tá ið Roger Hugdson treiv í tað fyrsta lagið á Vágsbøi, eftir at hann var seinkaður vegna veður í nógvar tímar. Óteljandi løtur hava verið sermerktar, men eitt sum hvørt ár er fantastiskt, er at vakna eftir ein festival og vita, at alt hevur gingið væl, sigur Steintór Rasmussen.

Summar Festivalurin hevur havt nógvar góðar løtur, men tær ringu hava eisini verið at funnið í Klaksvík. Millum annað kann nevnast veðrið, ið mangan hevur spælt fyrireikarunum eitt puss.

- Tann ringasta løtan, eg havi havt á Summar Festivalinum var tað árið, tá ið veðrið bleiv so ringt, at vit máttu avlýsa stóran part av festivalinum. Vit sótu allan festivalin við ótta fyri, at okkurt fór at henda. At festivalurin fór at enda í kaos. Men tað spældi kortini væl av, tá ið alt kom til alt, sigur Steintór Rasmussen.

- Tað er ein ótrúliga stóra ábyrgd, vit hava. Vit kunnu ikki verða barnagentir fyri allir festivalgestirnir, men vit góðari hjálp frá samarittum, løgregluni og øðrum hava vit hvørt ár megnað at hildið skil á kortini, sigur Steintór Rasmussen.